## Schumacher stuðlar spælarakeypi



Í Köln hava tey sett sær sum mál, at Lukas Podolski aftur skal til FC Köln, tá hetta kappingarárið er av. Men tað skal nógv til í hesum døgum, fyri at útvega tær umleið 70 milliónir krónurnar, sum Bayern München krevur fyri spælaran. Tí eru fólk í Köln farin undir at savna pening inn, fyri at stuðla keypinum. Fyrrverandi heimsmeistarin í Formel 1-kappkoyring, Michael Schumacher, hevur nú eisini latið eina upphædd til FC Köln. Schumacher hevur latið 875 evrur ella 6.500 krónur til innsavningina. Tað er heimasíðan pixel.fc-koeln.de, sum savnar peningin inn, og fyri 25 evrur ber til hjá Köln-fjepparum at keypa eitt pixel av einari 40.000 pixel stórari mynd av Lukas Podolski.

## Ivi um afrikanskan aldur

Norski FIFA-umboðsmaðurin, Gunnar Martin Kjenner, sigur við norska TV2, at ofta er torført at staðfesta aldurin á afrikanskum fótbóltsspælarum. – Hetta hongur saman við, at teir verða ikki skrásettir, tá teir eru føddir. Teir fáa aldurin, tá teir fáa eitt pass. Og tá talan er um fótbóltsspælarar, verða teir ofta gjørdir yngri, enn teir í veruleikanum eru. Vanligt er at siga í Afrika, at ein fótbóltsspælari hevur tveir aldrar – ein veruligan aldur og ein fótbóltsaldur. Fyrrverandi ítróttarleiðarin í norsku fótbóltsfeløgunum, Lyn og Frederikstad, Morgan Andersen, sigur seg mangan hava upplivað, at fleiri afrikanskir fótbóltsspælarar á pappírinum høvdu sama føðingardag.

## Formuladeildin verið eitt gott brand

**FÓTBÓLTUR**
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

– Tað man vera fáur, ið ikki kennir til Formula.fo umvegis navnið Formuladeildin hesi síðstu fýra árini, sigur forstjórin í Formula.fo, Hákun Steingrímsson, nú fyritøkan ikki longur eigur navnið á bestu føroysku fótbóltsdeildini.

– Alt hevur sína tíð, og eftir fýra ára samstarv var tíðin nú komin til, at onkur annar kundi taka yvir, sigur forstjórin í Formula.fo, Hákun Steingrímsson, sum ikki ivast í, at besta mansdeildin í fótbólti hevur verið eitt gott brand fyri fyritøkuna.

– Umframt at sjálv deildin hevur itið Formuladeildin, hevur millum manna eisini verið tosað um Formulaspælarar og alt møguligt annað. Hóast vit ikki hava roknað upp á hetta krónu fyri krónu, so er einki at ivast í, at hetta hevur brandað okkum sera væl.

Hákun Steingrímsson sigur, at tað fyri Formula.fo ikki bara hevur snúð seg um at fingið nakað aftur fyri brúkið av navninum, men at hetta eisini hevur verið eitt gott høvi til at stuðla fótbóltin.

– Vit hava í øllum førum verið fegin um, at vit hava fingið hjálpt føroyskum fótbólti hesa tíðina, og vit hava allan vegin ígjøgnum havt eitt gott samstarv við Fótbóltssambandið, sigur hann.

– Og tað man í øllum førum vera fáur, ið ikki kennir til Formula.fo umvegis Formuladeildina hesi síðstu fýra árini.




*Høgni í Stórustovu, FSF-forseti, og Bjarni Askham Bjarnason, stjóri í Vodafone, høvdu tað stóra smílið á andlitunum, tá teir í morgun skrivaðu undir sáttmálan, sum merkir, at besta deildin í føroyskum mansfótbólti næstu trý árini eitur Vodafonedeildin*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# Farvæl Formuladeildin og vælkomin Vodafonedeildin

**Næstu trý árini eitur besta mansdeildin í fótbólti Vodafonedeildin. Fótbóltssambandið og Vodafone skrivaðu í morgun undir ein sáttmála, ið tryggjar fótbóltsfeløgunum inntøkur frá navninum, meðan Vodafone væntar sær marknaðarføring fyri pengarnar**

**FÓTBÓLTUR**
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Frá fótbólti kenna vit støðuna, tá linjudómarin við báðum hondum lyftir flaggið vatnrætt upp um høvd fyri at markera, at nú skal gerast ein útskifting í dysti. Og hetta var júst myndaliga støðan í morgun, tá Formula.fo fór út og Vodafone kom inn.

Klokkan var nakrar minuttir í níggju, tá Høgni í Stórustovu, FSF-forseti, og Bjarni Askham Bjarnason, stjóri í Vodafone, settu sínar undirskriftir á sáttmálan, ið merkir, at besta mansdeildin í føroyskum fótbólti ikki longur skal eita Formuladeildin, sum hon hevur gjørt tað síðani 2005, men nú skiftir navn til Vodafonedeildin.

Samband hevur verið millum Fótbóltssambandið og Vodafone í eina tíð, men tað er serliga síðstu tvær vikurnar, at tingingarnar millum partarnar hava verið so mikið ítøkiligar, at eitt veruligt samstarv nú kundi spyrjast burturúr.

### Marknaðarføring

– Fyri feløgini merkir samstarvið, at tey kunnu rokna við einari inntøku í trý ár, tí øll upphæddin fer óskerd út til feløgini, sigur Høgni í Stórustovu, sum nevnir marknaðarføringina av fótbóltinum sum ein stóran síðuvinning í samstarvinum við Vodafone.

– Fyri føroyskan fótbólt og Fótbóltssambandið merkir hetta, at platformurin fyri marknaðarføring av fótbóltinum er styrktur, tí teirra royndir av beinleiðis marknaðarføring mótvegis brúkaranum koma eisini at hjálpa okkara máta at marknaðarføra uppá.

Og júst marknaðarføringin er eisini lyklaorðið, tá Bjarni Askham Bjarnason skal lýsa fyrimunirnar fyri Vodafone í nýggja samstarvinum við Fótbóltssambandið:

– Vit síggja hetta sum ein góðan møguleika at styrkja marknaðarføringina hjá okkum. Serliga, nú vit í fjør broyttu navn, fáa vit við hesum ein góðan møguleika at fáa sligið hetta navnið ordiliga fast, sigur stjórin í Vodafone.

– Somuleiðis fáa vit ein massivan marknaðarføringsplatform á fimm støðum kring landið, hvørja ferð tey 27 umførini í Vodafonedeildini eru á skránni. Og tað er nakað, vit avgjørt kunnu brúka til nakað.

### Trý ár fyri fyrst

Tað fer óivað at taka eina løtu hjá fólki at venja seg við nýggja navnið á bestu mansdeildini, tí hesi fýra árini, síðani deildin í 2005 fekk navnið Formuladeildin, hevur tað veruliga fest seg og er blivið ímyndin av sunnudagsfótbólti kring landið.

Tá spurt verður um longdina á sáttmálanum, sum altso gevur deildini navnið Vodafonedeildin næstu trý árini, duga hvørki Høgni í Stórustovu ella Bjarni Askham Bjarnason at siga, hvussu verður, tá hetta trý ára skeiðið er farið.

– Sum tíðirnar eru júst nú, hevur tað í øllum førum stóran týdning, at vit kunnu fáa ein sáttmála, sum fevnir um fleiri ár. Og í sáttmálanum er eisini latið upp fyri møguleikanum at halda fram, tá hesi trý árini eru farin, sigur Høgni í Stórustovu.

– Eg kundi eisini hugsað mær, at tað fyri Vodafone til ta tíð fer at kennast náttúrligt at vilja halda fast við eitt sovorðið brand, sum føroyskur fótbóltur nú eina ferð er.

Bjarni Askham Bjarnason sigur seg ikki kunna siga nakað um tað longu nú, men hann útihýsir ikki møguleikan fyri framhaldandi samstarvi, tá tey trý árini eru farin:

– Vit vita jú, at í Danmark hevur tað itið SAS-ligan í mong ár, so tað verður kanska náttúrligt hjá okkum at halda fram, tá komið er so langt. Men júst nú dugi eg slett ikki at svara upp á tað, sigur stjórin í Vodafone.